# gdu fyri tunnunum í lastini



*Fleiri av hesum konum minnast sildatíðina og sildabátarnar, sum vóru heimahoyrandi í Leirvík. Tær høvdu við áhuga leitað sær í Leirvíkar skúla týskvøldið, og her sita tær eftir frásøgnina hjá Absaloni Eliasen og práta í sofuni inni á bókasavni skúlans*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Zwartsnegger, so tað vóru aðrir enn eg, sum høvdu hetta arbeiði.

Men hesar tungu tunnurnar skuldu eisini rullast eftir dekkinum, áðrenn tær fingust niður í lastina, og her greiddi hann frá, hvussu hann plagdi at lyfta tunnurnar upp um forðingarnar á dekkinum við rullinum, tá ið skipið setti.

Absalon greiddi eisini frá ringum túrum til sjós, tá ið ótti var á fólki, og eingin hevði hoyrt frá skipinum, tí sjógvur hevði oyðilagt radioútgerðina.

Hann greiddi eisini hegnisliga frá, hvørji tól skipini høvdu til navigatión og útgerð annars, og hvussu væl teir gomlu dugdu at brúka hesi tól.

- Tey gomlu skipini høvdu magnet-kumpas, radio og radiopeilara.

Hóast Absalon seinni hevur staðið á skipsbrúgv ein hálvan mansaldur – bæði í farmaskipa-og ferðafólkavinnu, ásannaði hann, at hann onga leið hevði komið við teimum tólum, sum teir gomlu høvdu.

- Vit høvdu skipanina, sum rópt varð "konsol", umborð og konsol-kort, sum lisið varð við strikum og prikkum.

Hann segði, at hóast øll nútímans útgerð er umborð á Brimli, har hann hevur staðið á brúnni í mong ár, so er Brimil ikki komin betur fram, enn tey gomlu skipini komu við sínari útgerð.

Absalon greiddi eisini frá kenslunum, tá ið hann einaferð seinni í tíðini vitjaði støðina í Írlandi, ið hevði sent teimum hesi striku og prikkasignalini, sum so trygt hevur leitt sjófólk út á hav og heimaftur.

- Tað vóru eymar kenslur at síggja hesa støð, sum hevur havt so stóran týdning fyri skipaferðsluna, segði hann.

Hann greiddi eisini frá, hvussu onkur umborð á sildabátunum snildisliga máldi hitan niðri í sjónum við fløsku, sum hálað varð upp úr einum ávísum dýpi.

- Fløskan var lorað niður við proppi á, og tá ið hon var komin niður á rætta dýpið, varð proppurin hálaður úr, soleiðis at sjógvur rann inn í hana. Hetta sá ikki sørt "videnskabeligt" út, helt Absalon smílandi fyri.

## Glas í breyðið

Sildagørnini vórðu vanliga sett um kvøldið, og fekst ein tunna í hvørjum garni, tá ið farið varð at draga morgunin eftir, varð tað hildið at vera nøkulunda veiða.

- Vit tørnaðu altíð til at draga klokkan 05, og tað gingu nógvir tímar, áðrenn sildin varð avhøvdað, reinsað, saltað og komin í lastina.

Tey fyrstu gørnini vóru úr hampi, men seinni fingu teir nylon-gørn.

Monnum dámdu betri gørnini úr hampi, tí tey vóru ikki so hvøss og fóru eisini betur við sildini.

Meðan Absalon greiddi frá, nam hann eisini við onkra stuttliga hending umborð.

- Tann eina dagin brotnaði rúturin í skeilettinum, hóast skeilettið varð rimað omaná. Glasið fór í sor, og beint undir niðri í kabússini stóð kokkurin og elti breyð. Glasið fór niður deiggið. Kokkurin tók tað ringasta burtur úr aftur og elti síðan víðari. Men ikki veit eg; eingin umborð fekk skaða av hesum breyðunum.

Hann ásannaði, at sildatíðin gav nógv til samfelagið, bæði á sjógvi og landi, men hann er avgjørt ikki maðurin, sum heldur, at tað var garnaveiðan hjá sildabátunum norðanfyri, sum gjørdi av við sildina í sínari tíð.

- Eg ivist onga løtu í ,at tað vóru náttúruviðurskiftini, sum broyttust.

## Brestir fyrstur

Absalon greiddi eisini frá gongdini, tá ið vit fingu kraftblokkaskipini, og sildaveiðan broyttist og gjørdist nógv effektivari, og í hesum sambandi nevndi hann serliga pionerin, Júst í Túni á Toftum, sum fekk sær hýru við íslendskum báti fyri at læra kraftblokkin, sum hann tók til.

- Tað var Poul Hansen, sum setti fyrsta kraftblokkin í eitt føroyskt skip, og tað var Brestir, sum fyrstur var at royna eftir sild við nót.

Hann vísti á, at tað, sum kraftblokkaskipini kunnu fáa í einum háli, er líka nógv, sum tey gomlu sildaskipini fingu ein heilan túr!

Í síni frásøgn vísti Absalon eisini á, hvussu nógv føroyingarnir, sum arbeiddu í Íslandi í sinari tíð, tjentu.

- Eg sigldi tá sum yvirmaður við ferðamannaskpi til Íslands. Onkuntíð plagdi eg at lata meg úr uniforminum og fara millum hesar menninar at práta. Eg helt meg tjena væl, men tað vóru føroyingar, sum vóru í Íslandi, ið sum tjentu tríggjar ferðir so nógv sum eg.

Nógvir føroyingar vóru við á hesum ferðum vestur um hav, men millum hesar var næstan eingin leirvíkingur.

- Og tað hevði sína søgu, tí leirvíkingar hava dugað at skapt nógv virksemi, bæði í ringastu kreppum – og nú viðurskiftini eru heilt onnur, enn tey vóru tá, segði 67 ára gamli, Absalon Eliasen, í Leirvíkar skúla.

## Tónleikur og kaffi

Á tiltakinum í Leirvík týskvøldið settu Dánjal Eystursteín og Monica Stauss Joensen sín serstaka dám á løtuna við vøkrum klaverog violintónum, og eftir frásøgnina hjá Absaloni fingu tey mongu, sum komin vóru til tiltakið, eisini kaffi og góðar køkur í bókasavni skúlans.

Hetta var ein hugnalig og væleydnað løta, sum Bókasavnsnevndin hjá Leirvíkar kommunu skipaði fyri.



*Tær sita í Bókasavnsnevndini hjá Leirvíkar kommunu, t.v.: Monika Stauss Joensen, Guðrið L. Olsen og Randi í Jógvanstovu. Næsta tiltak, tær skipa fyri, verður um tey veiku og gomlu, har Jónvør Christiansen og Margaret Johannesen fara at greiða frá*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*